

SKAM

Norðurlandahúsið í Føroyum

# SEPTEMBER Í NORÐURLANDAHÚSINUM

## SKAM MARATON
***8.–10. september***

SKAM-abstinensir?
Leingist tú eisini eftir Noora, Vilde, Eva, Sana og Chris? Vikuskiftið 8.–10. september hevur tú møguleika fyri at endursíggja alt SKAM frá byrjan til enda.
Norrøna Ungmannafelag Føroyar, Kringvarp Føroya og Norðurlandahúsið hava nevnliga sligið seg saman um sýna allar fýra sesongirnar av SKAM sum maraton.
*Vikuskiftið endar við eini SKAM quiz, har vit kjósa Føroya størsta SKAM-nørd. Vinnarin fær tvær flogferðir til Noregs.*

## „BRYT TABÚT“
NORÐURLENDSK RÁÐSTEVNA
***11. og 12. september***

Almannamálaráðið saman við Nordisk Velfærdscenter skipa fyri ráðstevnu, sum varpar ljós á kynslív hjá fólki, sum bera brek og kynsligan ágang á fólk, sum bera brek.

## MARKLEYS ÚTBÚGVING 2017/18
***Fríggjadagin 14. september***

Far og lær – nær og fjar.

## VINNUDAGURIN 2017
***Leygardagin 15. september***

Vinnudagurin er hátíðardagurin hjá føroysku vinnuni, har umboð úr vinnuni savnast til áhugaverdar fyrilestrar og sosiala samveru.

## ÖZLEM CEKIC VITJAR
***Sunnudagin 16. september***

At byggja brýr og grava veitir. Özlem Cekic greiðir frá uppvøkstri og virki sínum á Fólkatingi.



Özlem Cekic



Svante og Katarina



Papper

***23.–30. september***

# Land í eygsjón:
# HEJA SVERIGE!

## SCENER UR ETT ÄKTENSKAP
***Fríggjadagin 29. og leygardagin 30. september***

Tey hava verið gift í 10 ár. Tvey børn, summarhús og sunnudagsdøgurða. Tey hava verið gift í 20 ár. Tey hava verið gift í 30 ár. Seks sjónleikarar. Seks tættir úr einum hjúnabandi. Og dreymurin úr lívlangan kærleika. Nýggj, viðurkend pallseting av kendu sjónvarpsrøðini hjá Ingmar Bergman.

## SVENSKT VÍSUKVØLD
***Hósdagin 28. september***

Kendir føroyskir sangarar tulka svenskar vísur eftir Evert Taube, Cornelis Vreeswijk, Bjørn Afzelius og mong onnur.

## SVENSKUR JAZZUR OG POPPUR
***Sunnudagin 24. september***

Konsert við Katarina (kend úr the Real Group) og Svante Henryson, sum syngja og spæla svenskan og altjóða tónleik, og Svante Henryson Kvartett, sum spæla nýggjan og vælsvingandi jazz.

## FØROYA SYMFONIORKESTUR VIÐ SVANTE HENRYSON
***Leygardagin 23. september***

Vinnarin av Tónlistavirðisløn Norðurlandaráðsins 2015, sello-leikarin og tónaskaldið Svante Henryson, spælir egið verk saman við Føroya Symfoniorkestri. Á skránni verður eisini tónleikur eftir svensku tónaskøldini Andreu Tarrodi og Franz Berwald.

## RYDH/SÖRENSON
***23. september– 5. november***

Rydh/Sörenson arbeiða við at skapa fyribils, staðkend verk í náttúruni. Eitt projekt, tey kalla Environmental Ephemerals. Tað at skapa nakað, sum er stokkut og fyribils, letur upp fyri eini serligari sjarmu og fyri heimspekiligum møguleikum.



Scener ur ett äktenskap



Træverkstovan hjá Emil í Lønnibergi



Papper

# TIL BØRNINI

## PAPPER – EIN UNDURFULLUR BARNALEIKUR
***Mikudagin 27. september***

Papper tekur støði í hugflogi barnanna. Úr pappíri skapast sveimandi fuglar, flákrandi firvaldar, ein hábærslig skjaldbøka og óteljandi aðrar verur. Pappírið verður rukkað, boygt, snúrað og skrætt, og verurnar umskapast, hvørva og koma aftur til lívs. Hóskandi fyri øll úr 4 árum og uppeftir.

## TJULAHOP TJULAHEY
***Leygardagin 30. september***

Pippi, Emil, Ronja og Jensina Olsen við bólki syngja og spæla sangir, sum eru kendir úr filmum, sangleikum og øðrum verkum, sum byggja á søgurnar hjá Astrid Lindgren.

## TRÆVERKSTOVAN HJÁ EMIL Í LØNNIBERGI
***23.–30. SEPTEMBER***

Óskikkilig børn kunnu sendast inn í skúrin hjá Emil í Lønnibergi, har tey sleppa at skapa eina lítla veru úr træ.



Rydh/Sörenson

**Fullfíggjað skrá fyri Land í eygsjón: Heja Sverige! verður kunngjørd á nlh.fo**

BANKNORDIK

SAMSKIP

**nlh.fo**

UPPLATINGARTÍÐIR

Mánadag– fríggjadag
kl. 9.00–17.00

Leygardag
kl. 10.00–17.00

Sunnudag
kl. 14.00–17.00




SMAKKA

– lætt, heilsugott og vistfrøðiligt

Tel. 53 54 55 / 22 46 61 **smakka.fo**

**MORGUNMATUR** kl. 9.00–11.30

**DØGURÐASJÁLVTØKUBORÐ** kl. 12.00–14.00

**LEYGARDAGSBRONSJ** kl. 10.00–14.00

**SUNNUDAGSSJÁVTØKUBORÐ VIÐ SALTFISKI** kl. 14.00–17.00

*Allan dagin bollar, rugtviflísar, djús, kaffi og kakur.*